# Luxus poppur frá Johnny DeLuxe




Poppbólkurin Johnny DeLuxe hevur hevur veruliga vind í seglunum, og nú hevur bólkurin fingið eina gullplátu fyri fløgusølu í Danmark

**TÓNLEIKUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Útgávan Luxus hjá Johnny DeLuxe0 fekk nú um dagarnar sonevnda gullvirðisløn í Danmark. Gullplátan verður latin, tá ein fløga hevur selt 20.000 eintøk, og tað hevur Johnny DeLuxe megnað við seinastu útgávuni.

Tað eru ikki minst hittini Drenge Som Mig og Joanna, sum hava slóðað fyri eini stórari sølu av útgávuni, og live-framførslurnar hjá bólkinum hava eisini styrkt munandi um umdømið hjá teimum.

Johnny DeLuxe hevur seinasta árið verið mett sum størsta poppnavn í Danmark, og serliga tey ungu hava av álvara tikið bólkin til sín. Tað hevur verið at sæð aftur á hitlistunum í Danmark, har Johnny DeLUxe hevur gjørt nógv um seg seinasta árið.

### Nógvar áheitanir

Bólkurin Johnny DeLuxe varð stovnaður í London í 2000, og síðani hevur gingið støðugt framá hjá teimum. Í 2004 var bólkurin valdur til besta nýggja navn í donskum tónleiki á Zulu Awards, og eftir at seinasta útgávan hjá Johnny DeLuxe kom út í fjør, hevur bólkurin fingið platin-virðisløn fyri søluna av hesari útgávu – Luksus kallast fløgan.

Tveir av tónleikarunum í Johnny DeLuxe høvdu eina framførslu á Planet Awards í Havn fyrst í hesum árinum, og síðani hava fyrireikararnir av Summar Festivalinum fingið nógvar áheitanir frá fólkinum um at fáa teir at spæla á festivalinum í ár.

Tónleikararnir í Johnny DeLuxe vilja eisini fegnir koma aftur til Føroya at spæla, og hesaferð koma teir við øllum kanónunum – fullum orkestri og øllum hittunum. Bólkurin fer at hava eina rimmar framførslu á Summar Festivalinum leygarkvøldið 5. august.


## Skrivsstovufólk

Av tí at eitt av starvsfólkum okkara fer í farloyvi fram til 1. juli 2007 verður søkt eftir einum skrivsstovufólki at arbeiða 30 tímar um vikuna, at byrja skjótast til ber.

**Arbeiðið fevnir um:**
- Umsiting av sølufakturum
- Avrokning av skipum
- Tollingar
- Lønir
- Bókhald

og annað fyrifallandi skrivsstovuarbeiði.

**Løn:**
Løn sambært avtalu.

**Vit vænta at tú er**
- sjálvstøðug/ur í tínum arbeiði,
- hevur góð samstarvsevni,
- hevur kunnleika til bókhald.

Umsóknin skal saman við prógvum og møguligum viðmælum sendast til:

**P/F O.C Joensen**
**Postboks 40**
**Oyrarvegur 16**
**FO-450 Oyri**

*innan tann 14 juli 2006*

*Um tygum hava spurningar viðvíkjandi starvinum eru tygum vælkomin at seta tygum í samband við Margit á tlf 422256*

O.C.JOENSEN
Besta sjógæti av Oyri

WWW.OCJ.FO